einfaldari
- ger tað einfaldari

Mai 2012

# IKTUS sendir kærleiksbrøvini




**Hálvan mai byrjar IKTUS at senda røðina "Bíblian - 66 kærleiksbrøv". Hetta eru talur, sum hava verið í Lívdini í vár. Talan er um 10 partar.**

**IKTUS sendir mikudag til leygardag kl.11.00, 16.00, 21.00 og 02.00. Sunnudag frá kl.14.30 og 21.00 verður endursent frá vikuni.**

**Sí skránna og les meira á www.iktus.fo.**

### Kaldur kærleiki

Og tykkum lati Harrin taka til og fáa yvirflóð í kærleikanum hvør til annan (1. Tess. 3, 12a)

Suðurpólurin kundi verið kallaður tað heilsubesta plássið í heiminum. Har er eingin dálking, einki støv, ógvuliga fá fólk, og luftin er eins frísk og rein, sum hon má hava verið allastaðni, áðrenn menniskjað byrjaði at oysa dálking út í atmosferuna. Haraftrat er tað eitt av fáu plássunum í heiminum, har menniskjað ikki er undirdíkt við bakterium, tí har er ikki bara ov kalt, men har er heldur einki fyri tær at liva á. Og vindarnir byrja allir á Suðurpólinum og blása norðureftir, og teir halda allari dálking burtur frá økinum.

Nú kundi ein hildið, at fólk eru sera altrá eftir at liva í einum slíkum øki uttan bakteriur, men soleiðis er tað als ikki. Har er alt ov kalt, heilt niður í 75 kuldastig.

Nakrar samkomur líkjast heilt nógv hasum økinum. Sannleikin í Orði Guds verður prædikaður, mistøk hava ongan møguleika, og tað verður gingið høgt upp í, at Skriftin verður miðvíst siterað. Men har er einki lív og eingin kærleiki. Fleiri velja at fara uttan at hava kent seg elskaðan, og uttan at nakar hevur víst teimum áhuga. Tey fátæku kenna heldur ongan áhuga (Ják. 2, 13), tey veiku í trúnni verða drigin inn í køld orðaskifti (Róm. 14, 1), og systkin í Kristusi verða hildin uttanfyri, bara tí tey eru nýggj og eru ein hóttan ímóti tí etableraða samkomulívinum.

Vit hava stórliga brúk fyri at minnast, at samkoman upprunaliga var skapt til at vera eitt tað heitasta plássið í heiminum. Hon er grundað á kærleika Kristusar, sum setir í frælsi. Okkara tráan skal tí ikki einans vera at halda bakterium burtur men at skapa eitt umhvørvi, har brøður og systrar kunnu opna sítt hjarta fyri lekjandi kærleika Guds.

*(úr "Our daily bread" – skriva hevur M.R.D. II)*

## Hendingar & tiltøk

### Til lukku við hjúnabandinum



Mikudagin 4. apríl 2012 giftust Beinta Káradóttir úr Hoyvík og Izaac Ochondo Oludoh úr Homa Bay, Kenya. Vígslan var á Ráðhúsinum í Havn, og um kvøldið var opið hús Millum Gilja 119, har nógv fólk vóru komin saman fyri at gleða brúðarparið.

### Sunnudagsskúlin til Eiðis



Sunnudagin 13. mai fer sunnudagsskúlin í Lívdini útferð norður til Eiðis at vitja samkomuna Mizpa, har sunnudagsskúli verður við sangi, søgum, spølum og hugna. Útferðin er fyri børn frá forskúlaaldri til 4. flokk.
Farið verður við bussi frá Skúlanum við Løgmannabreyt kl.11.30. Bussurin verður aftur í Hoyvík uml. kl.15.30, tá børnini kunnu heintast við skúlan. Eingin sunnudagsskúli verður í skúlanum sunnudagin 13. mai.
Tilmelding fer fram í seinasta lagi fríggjadagin 11. mai hjá Siri Hjørleifsdóttir á tel. 277005 / 421712, mail: jens_k@kallnet.fo. Tekningarlistar eru á kunningarborðinum hjá Lívdini.

## Dópur í Hebron




Mánakvøldið 23. apríl skipaði samkoman Lívdin fyri dópi, sum var í Hebron á Argjum. Tær, sum blivu doyptar, vóru: Kristina Jakobsen, Lotta Johansen og Noomi Eysturtún.

## Kunningartiltak um Zarepta

Kunnandi fundur um Zarepta verður leygardagin 12. mai kl. 15.00 í Zarepta. Øll, sum hava áhuga í verkinum í Zarepta, eru vælkomin.

## Postadressan hjá Lívdini

Postadressan hjá lívdini er: Samkoman Lívdin, Oman Hoydalar 28, Postsmoga 3116, FO-188 Hoyvík.

## Lívdin á Facebook

Lívdin hevur sín egna profil á Facebook, sum er: www.facebook.com/Livdin. Har verða upplýsingar um aktivitetir o.a. regluliga lagdir út.

## PAROLA 2012




Frá 6. - 13. august 2012 verður ein føroyskur mini-bíbliuskúli í Italia.
PAROLA, ið merkir orð, hevur til endamáls at geva trúgvandi føroyingum møguleika at koma burtur frá strongda gerandisdegnum og brúka tíð í Orðinum.
Um hetta hevur tín áhuga, kanst tú seta teg í samband við Einar Vang tel. 528038 einarvang74@gmail.com ella Regin Guttesen tel. +39 32 8141 2581 reginguttesen@gmail.com.

## Blái Krossur vitjaði



Leygarkvøldið 14. apríl 2012 vitjaði Olga Magnussen frá Bláa Krossi Føroya ungdómstiltakið Alive.
*"Børn og ung í dag eru meiri upplýst um vansarnar og avleiðingarnar av rúsdrekka".*
Kelda: Blákrossblaðið

• Blákrossblaðið er at fáa á kunningarborðinum hjá Lívdini

## Bøn og undirvísing




Týskvøld kl. 20.30 er møti í Lonini oman Hoydalar 28. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar.

## Skráin fyri týskvøldini mai 2012

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 1. mai | Bønarmøti |
| Týskvøldið 8. mai | Bønarmøti |
| Týskvøldið 15. mai | Kyknubólkar |
| Týskvøldið 22. mai | Trin 3: Andaligu gávurnar og tænastan í samkomuni (1/2) |
| Týskvøldið 29. mai | Trin 3: Andaligu gávurnar og tænastan í samkomuni (2/2) |



# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 6. mai**

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Ninna Reinert Lydersen lutar um lívið saman við Jesusi í dagligdegnum

UngLív Zakeus (Ejler Eysturtún)



Ejler

**Sunnudagin 13. mai**

Familjumøti kl. 10.30: MC og Dupultkvartettin luttaka

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Hásongurin: Sannir elskarar
Talari: Jógvan Zachariassen

UngLív Sosialt tiltak



Jógvan

**Sunnudagin 20. mai**

Familjumøti kl. 10.30: Leiðsluskifti í Ignite

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Soheila Fors luttekur

UngLív Hví doyði Jesus (Høgni Johannesen)



Høgni

**Sunnudagin 27. mai**

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Hásongurin: At koma saman
Talari: Jógvan Zachariassen

UngLív Jesus og lærusveinarnir (Durita Djurholm)



Durita

**Ungdómstiltøk:**

Alive: leygarkvøld kl. 21.00

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*